Nýtt fitness-sentur í Klaksvík:

# Kom í TopForm

**Leygardagin lat eitt nýtt fitness-sentur dyrnar upp í Klaksvík. Tað eru hjúnini Herdis Klein Østerø og Absalon Østerø, sum fara at reka fitness-sentrið, sum hevur fingið navnið Top Form.**

HEILSA
*Ragnhild Ellingsgaard*

Klaksvík:
Herdis tekur ímóti Sosialinum í avgreiðsluni inni í Top Form. Frá einum av hølinum hoyrist skrambul av ymsum slag, og Herdis greiður frá, at hóast klokkan enn ikki er vorðin 10.00, so eru fólk farin í gongd. Helst vil onkur trimma sær kroppin, nú Norðoyastevnan nærkast.

### Fleiri vitjanir

Leygardagin varð skipað fyri eini móttøku í nýggja sentrinum, har fólk kundu støkka inn á gólvið og hyggja seg um.

- Og áhugin sýntist at vera rættiliga stórur, sigur Herdis, sum harumframt hevur góðar vónir, viðvíkjandi hvussu alt hetta fer at spæla av.

- Fólk leggja stóran dent á at verða í góðum formi í dag, og nú hava tey so møguleikan fyri at gera okkurt við tað, eisini í Klaksvík, greiðir hon frá.

Mánadagin hevði Top Form opið fyri fyrstu ferð, og vóru hølini full av vitjandi allan dagin.

- So hetta boðar avgjørt frá góðum, heldur Herdis.

### Einasta í býnum

Fitness-sentrið Top Form er einasta sentrið av sínum slag í Klaksvík.

Sentrið heldur til á Stangavegi, í teim gomlu hølunum hjá BodyCare. BodyCare var í síni tíð eisini eitt fitness-sentur, men her kundu einans bólkar leiga seg inn til nakrar venjingartímar um vikuna. Herdis og maðurin leigað hølini frá BodyCare, og hava tey eisini keypt onkrar av teim maskinunum, sum BodyCare kundi bjóða fólki.

- Tó eru allar maskirnur nýumvældar, eins væl og vit hava umvælt øll hølini í sentrinum.

Millum tilboðini hjá Top Form finna vit steppmaskinur, súkklur, eina fitbox, innan- og uttanlærsmaskinur og eisini rógvimaskinur.



*Nógvar eru maskirnurnar at velja ímillum*

- So tað er bara at fara í gongd, smílist Herdis.

Umframt alt hetta kunnu tey vitjandi eisini hugna sær í einum bobli-baði, sum er avskilt frá hinum hølunum. Her kann ein hvíla seg aftaná tær hørðu venjingarnar, og síðani fara til hús aftur við nýggjari orku.

### Gamal dreymur

Herdis greiður frá, at hon í fleiri ár hevur gingið við einum dreymi um at lata upp eitt fitness-sentur í Klaksvík.

Klaksvíkingar hava í langa tíð ikki havt nakran møguleika fyri av álvara at fara í gongd við slíkar venjingar, tí eingin hevur bjóðað slík tilboð fram.

- Nógv hevur verið prátað um, at einki var at fara til í Klaksvík, og sjálv helt eg tað eisini verða sera keðiligt, sigur hon.

Tí fóru hon og maðurin fyri eini tíð síðani í gongd við fyrireikingarnar til nýggjasta heilsu-staðið hjá klaksvíkingum.

Tey hava bæði verið á ymsum skeiðum, soleiðis at tey eru før fyri at læra frá sær eisini, og eftir ætlan skulu tey skjótt aftur á skeið.



*Stórur áhugi er fyri nýggja fitness-sentrinum í Klaksvík*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at okkara elskaða dóttir, systur og svigerinda

**Marianna Joensen**
Gøtueiði

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum
fríggjadagin 24. mai 2002 – 23 ára gomul.

*Familjunnar vegna*
**Birgitta og Jonhard**

Tey, ið vilja minnast Marionnu, kunnu lata eina peningagávu til nýggja bygningin »Keldan« í Skálafirði. Konto í peningastovnunum.





TELEBÚÐIN
Tvøroyri
Kaffi og sodavatn
Pinnamatur
Ballónir
Karamellur
Letur upp fríggjadagin 31/05
Opið frá kl. 11.00 til 17.00
• KL. 11.00 til ?
Kø-tilboð: 10stk NOKIA 5510
995,-
vanligur prísur 2799,-
• KL. 12.00 til 13.00
BOÐTÆNASTAN Fá tín egna telefonsvarara og eina T-shirt
• KL. 13:00 til ?
Kø-tilboð: 10stk NOKIA 5510
995,-
vanligur prísur 2799,-
• KL. 16:00
Greipuvinnararnir 2002
1. deildar kvinnuliðið hjá TB í flogbólti kemur í Telebúðina at fáa handaða eina peningagávu frá Føroya Tele
Vinn eina ERICSSON T68i
virði
5199,-
Svara nøkrum spurningum og tú ert við í kappingini
Drigið verður kl. 15:30
FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum







